tíðindablaðið

# sosialurin

Nr. 54 Mikudagur 19. mars 1997 71. árgangur Kr. 7,00



*Sigurð Poulsen, landsbankastjóri:*

# Mugu tálma vøksturin

*Fleiri avgjøld og meira skattur kunnu steðga einum galoperandi hákonjukturi. Einasti møguleiki at avmarka einum ógvusligum hákonjukturi er at tálma vøksturin sigur Sigurð Poulsen, landsbankastjóri*



## Lotta leiðir og aktar

Síða 7

*Uni Rasmussen hevur sum fyrsti føroyingur fingið førarahund.*



*Løgmaður Edmund Joensen og Davíð Oddsson, forsætisráðharri í túnunum í Tinganesi*

*Davíð Oddsson, forsætisráðharri :*

## Kenni meg heima í Føroyum

*–Hjarta og lívsáskoðan sláa í takt millum Føroyar og Ísland sigur íslendski forsætisráðharrin, sum er á almennari vitjan í Føroyum saman við konuni Ástríður.*

Síða 12 og 13

*Íslendski forsætisráðharrin Davið Oddsson á Føroyavitjan:*

# -Eg kenni meg heima í Føroyum

*-Hjarta og lívsáskoðan sláa í takt millum Føroyar og Ísland sigur íslendski forsætisráðharrin, Davið Oddsson, sum er á almennari vitjan í Føroyum. Hann sær fegin, at tættari bond verða knýtt millum londini, bæði búskaparliga og mentanarliga. Hann vónar, at føroyingar finna olju og heldur, at Noreg er góð fyrimynd hjá bæði føroyingum og grønlendingum, tá farið inn í eina oljuøld. Tíðindablaðið Sosialurin hevur tosað við íslendska stjórnarleiðaran*

JAN MULLER



*Davið Oddsson og Edmund Joensen í Tinganesi í góðveðrinum í gjár*

*Myndir Jens K. Vang*

Bæði handilsligu- og mentanarligu bondini millum Ísland og Føroyar skulu knýtast enn tættari. Hetta er høvuðsniðurstøðan hjá teimum báðum stjórnarleiðarunum, Davið Oddssyni og Edmundi Joensen, eftir fund í Tinganesi í gjár.

Hetta er fyrstu ferð, at Davið Oddsson vitjar í Føroyum, síðani hann tók við sum forsætisráðharri. Hann var annars í Føroyum í 1989, tá hann var borgarstjóri í Reykjavík.

Tað var Edmund Joensen, løgmaður, sum herfyri beyð Davið Oddsson og konuni Ástríður Thorarensen at vitja í Føroyum.

Skráin fyri vitjanina er sera fjølbroytt. Mánadagin vitjaðu íslendsku forsætisráðharrahjúnini skúlan á Gilјanesi og fornminnini í Kirkjubø.

Í gjár varð vitjað í Tinganesi, í løgtinginum, á Oljufyrisitingini og á Fróðskaparsetrinum.

Í dag gongur leiðin til Faroe Seafood Prime, Norðurlandahúsið, Tórshavnar Býráð og Listaskálan.

Eftir fundin í Tinganesi í gjár var tíðindafundur.

**Økt samvinna**

Edmund Joensen sigur seg vera væl nøgdan við vitjanina higartil og heldur, at hon fer at bera ávøkstur. Hann sipar her til samrøðurnar við Davið Oddsson um økt samstarv millum londini bæði á tí handilsliga og tí mentanarliga økinum.

Eitt nú er ætlanin at skipa fyri handilsmessum bæði í Reykjavík og í Tórshavn til tess at stimbra hetta samstarv.

Á fundinum við løgmann í gjár segði Davíð Oddsson seg vilja virka fyri at fáa føroyingum eina samlaða avtalu við øll EFTA-londini, soleiðis at Føroyar sleppa undan at skula avtalur við hvørt landið sær.

Á fundinum í Tinganesi varð eisini tosað um týdningin av at fáa onnur lond at virða ábyrgdina og rættin hjá eitt nú Íslandi og Føroyum at røkja fiskastovnarnar her um leiðir.

Bæði londini eru annars nøgd við tær avtalur, sum eru gjørdar um bæði sild, loðnu og botnfisk.

**Fara ongantíð at gloyma stuðulin**

Davið Oddsson sigur seg vera sera ernan og fegnan um at vitja aftur í Føroyum.

Og sum ikki einaferð er tað veðrið, sum er fyrst á lofti. Hann er ikki sørt hugtikin av tí skiftandi veðrinum. Tá hann lendi í Vágum var regn og vindur. Dagin eftir er sólskin.

-Eg vil fyrst og fremst takka føroyingum fyri tann stuðul til lótu okkum íslendingum eftir hervilígu náttúruvanlukkurnar. Vit íslendingar fara ongantíð at gloyma hetta.

Davið Oddsson vísir annars á, at meðan Ísland í árunum frá 1992 til 95 hevði búskaparligar trupulleikar at dragast við, so er støðan í dag góð. Hann vónaði tó ikki, at hann skuldi koma heimaftur til eitt verkfall.

Íslendski forsætisráðharrin heldur tað liggja stórir møguleikar at økja samvinnuna millum londini, bæði tá talan er um útflutning og innflutning.

-Londini eru meinlík. Marknaðirnir eru teir somu og fólkið hugsar tað sama. Her skuldu verið møguleikar hjá báðum londum at ríkið sínamillum handil.

Í hesum viðfangi nevnir hann eisini ynski um at halda handilsstevnur í báðum londunum. Hann sigur seg vilja mæla til at stuðla fyrireikingini av slíkum tiltøkum.

**Ísland og ikki Bruxelles avgerðarrættin í fiskivinnumálum**

Vit spurdu Davið Oddsson, um Ísland fer at standa uttan fyri EU í alla framtíð?

-Tað er ringt at siga, hvat framtíðin fer at bera við sær av broytingum, eisini innan EU. Men soleingi EU rekur núverandi fiskivinnupolitikkin kemur ikki upp á tal at innlima seg í henda felagsskap. Um felagsskapurin verður ein annar í framtíðin



*Tingformaðurin býður íslendsku gestunum væl komnar innan tinggátt*



Davíð Oddsson. -Vit vilja hava fullan avgerðarrætt yvir fiskatilfeinginum



Poul Mohr, íslendski konsulin í Føroyum heilsar uppá Davíð Oddsson

fer tíðin so at vísa, og mugu vit til ta tíð taka støðu til limaskap.

Hann vísir annars á, at tað er greiða støða íslendinga, at teir sjálvir vilja hava tað síðsta orðið at siga, tá talan er um fiskatilfeingið kring Ísland. Hetta er og verður íslendskur avgerðarrættur.

**Heldur samstarv enn samveldi í Norðuratlantshavi**

Hvørjar tankar hevur Davíð Oddsson gjørt sær um eina unión - eitt samveldi - í Norðuratlantshavi, sum fevnir um Føroyar, Ísland og Grønlandi og møguliga eisini Noreg!

-Eg trúgvi ikki uppá eina slíka unión men heldur uppá eitt samarbeiði millum øll londini. Vit eiga at halda fram við verandi samstarvi og menna tað.

Ein spurningur, sum hevur verið frammi av og á er ætlanin hjá íslendingum at útflyta elorku til Skotlands og meginlandið - um Føroyar. Hvussu realistisk er henda ætlanin?

**Ivasamur um elkaðal**

-Vit hava arbeitt við hesum tankanum. Tað vísir seg at bera til tekniskt og fíggjarliga tykist tað næstan at bera til eisini - í næstu framtíð.

Men hetta er ikki so einfalt, sum tað kann tykjast. Tí spurningurin er, um vit íslendingar halda tað vera eitt gott hugskot at flyta út orku sum rávøra - ella vit sjálvir vilja brúka hesa orku sum rávøru í egnum landi at skaffa arbeiði og menna ídnaðin!

Davíð Oddsson vísir á, at higartil hevur verið hildið, at Ísland hevur bert troytt 6-7% av verandi orkukeldum og at stórar orkukeldur liggja ov bíða eftir at verða troyttar.

-Skulu vit nú til at útvega nógv meira av orku eitt nú til útflutnings, so merkir tað, at vit skulu til at broyta land okkara. Ein stórur partur av landinum skal leggjast undir vatn, og spurningurin er so, um tað er hetta vit vilja. Veruleikin í dag er tann, at vit hava als ikki so nógva orku tøka, sum vit higartil hava hildið.

**Loysa marknaosemju við samráðingum**

Ein spurningur, sum ósemja er um millum Føroyar og Ísland, er markið millum londini. Vit spurdu Davíð Oddsson, hvat íslendingar ætla sær at fáa burtur úr, nú teir hava skundað undir samráðingarnar!

-Vit halda tað er rætt at samráðast við føroyingar og danir og grønlendingar um markið millum londini. Eftir okkara tykki eiga vit ikki at fara til ein altjóða dómstól við málinum, tí tað verður bæði ov dýrt og fer at taka ov langa tíð.

Eg trúgvi, at vit fara at finna eina samráðingar loysn saman.

Íslendski forsætisráðharrin heldur tað kann koma upp á tal við eini fyribilsloysn, fyri so seinni at fremja eina varandi langtíðarloysn.

**Voni føroyingar og grønlendingar finna olju**

*-Hvussu kenst tað at vera íslendingur og standa og hyggja at, meðan granna londini Føroyar og Grønland hava oljufepur!*

-Eg fylgi við gongdini á hesum øki við stórum á huga. Tað hevði glett meg, um grannar okkara fyri eystan og vestan fingu hesar møguleikar. Land okkara er so ungt, at eg trúgvi ikki, at olja finst her. Men kanska hevur Gud verið so rættvísur, tá hann gav okkum heitu keldurnar, at hann tá gav tykkum oljukeldurnar. Eg kann bert ynskja tykkum tillukku, um tit skuldu funnið olju.

Uppá fyrispurning um ikki olja kann forkoma hesum smáu samfeløgunum vísir Davíð Oddsson á, at Ísland var eitt fátækt land fyri 60-70 árum síðani.

-Vit hava síðani tá fingið stórt ríkidømi, og eg haldi ikki, at hetta hevur forkomið okkara samfelag, heldur tvørturímóti.

Davíð Oddsson heldur føroyingar og grønlendingar eiga at brúka Noreg sum fyrimynd, tá farið verður at leita eftir olju.

Hyggið eftir, hvussu væl okkara norsku vinir hava dugað at borið seg at.

**Vil stuðla ungum listafólki**

Tosað hevur ikki bert verið um handil og búskap undir vitjanini. Høvið hevur eisini verið at umrøða mentanar spurningar.

Davíð Oddsson sigur, at eisini mentanarligu bondini eiga at verða knýtt fastari millum londini. Og her hugsar hann ikki minst um ungdómin.

-Eg síggi fegin, at meira verður gjørt fyri ungdómin í londunum, og vit vilja fegnir seta pengar av til hetta endamál.

Her hugsar hann m.a. at stuðla listarligari samvinnu av ymsum slag.

Nú Ísland hevur verið sjálvstøðug tjóð í mong ár spurdu vit forsætisráðharran, um hann hevur nøkur góð ráð at láta føroyingum í so máta! Heldur hann íbúgvaratalið verða avgerandi fyri, um eitt land kann gerast sjálvstøðug tjóð!

-Eg fari ikki at koma við góðum ráðum á hesum økinum. Hetta er nakað, sum hvørt einstakt land sjálvt má avgera.

Hann leggur tó afturat, at støddin á einum landi ella talið á íbúgvum er ikki avgerandi fyri, um tað kann verða sjálvstøðugt ella ikki.

-Vit vóru 130.000 íslendingar, tá vit tóku loysing. Í dag eru vit 270.000. Hetta hevur einki havt at siga í tí sambandinum.

**Hjartað og lívsáskoðan sláa í takt**

Vit spurdu at enda Davíð Oddsson, hvat serliga hevur hugtikið hann undir vitjanini í Føroyum?

-Tað er fyrst og fremst hetta at síggja, hvussu eins vit íslendingar og føroyingar hugsa og bera okkum at. Tað er einastandandi at koma til eitt annað land og so uppliva, hvussu eins hetta fólkið og eins egna fólk er.

Eg haldi, at bæði lívsáskoðan og hjarta sláa í takt millum londini.



Edmund Joensen og Davíð Oddsson uttan fyri løgtingið